*Myndir: Kjartan Madsen*



# Bøgesvang ávarar móti følskum profetum

**Eftir átta ár í Svøríki, har Marjun Bæk avloysir fyrrverandi klaksvíksprestin, Henning Bøgesvang, er hann nú fluttur heimaftur til Føroya. Fyribils hevur Bøgesvang tikið eitt avloysarastarv upp á hálvt ár á Gjaranesi, eftir at Jógvan Fríðriksson er vorðin biskuppur**

Í fyrstu prædiku síni sunnudagin í Sjóvar kirkju tosaði Henning Bøgesvang út frá dagsins teksti, tá eingilin bað Mariu vera móðir at Jesusi.

Bøgesvang setti hetta í samband við nútíðina, har hann vísti á, at nógvir falskir profetar eru uttanum okkum.

- Maria var ongantíð í iva, og tað vil altíð vera ein persónlig avgerð, um vit trúgva upp á tað, vit hoyra, sigur Henning Bøgesvang.

Presturin ávarar ímóti religiøsum fanatikarum, sum ikki eru annað enn falskir profetar. Teir finnast eisini her hjá okkum, vísir hann á.

- Hvør einasti persónur hevur sítt loyniliga rúm, har man ger upp við seg sjálvan, hvat er rætt, og hvat er skeivt. Tí skal man ikki lata seg villeiða, men brúka sína egnu intuitión, tí einans hon kann hjálpa tær við at taka ta røttu avgerðina. Tað er ein spurningur um at liva eitt rætt lív, og ikki eitt fanatiskt lív, sigur Henning Bøgesvang.

**kári**

*Nógvir strandingar vóru komnir í kirkju sunnudagin at heilsa upp á »nýggja« prestin*



*Komandi seks mánaðirnar fer Henning Bøgesvang at virka sum prestur í Sjóvar prestagjaldi*



*Fráfarni presturin á Gjaranesi, Jógvan Fríðriksson, sum nú hevur tikið við sum biskuppur, var sjálvandi eisini tilstaðar í Sjóvar Kirkju sunnudagin*